# Stór krøv til veitarar

Jan Müller

Millum fyrilestrarhaldarnar á Oljutinginum í farnu viku var eisini eitt umboð fyri oljufelagið Statoil, sum er eitt av fyristøðufeløgunum, ið hevur fingið boriloyvi við Føroyar. John Inderhaug tosaði um treytirnar fyri at vera veitari og um krøv til samstarvsfelagar. Hann vísti á, at tað mesta ella umleið 95% av øllum virkseminum í leitiskeiðinum, liggur á veitarunum. Tí er tað minimalt, hvat oljufeløgini sjálvi eru uppi í. Hóast tað í Føroyum verður tørvur á eini útgerðarhavn frá byrjan, so duldi hann ikki fyri, at meginparturin av virkseminum í sambandi við leiting verður flutningur.

Hann vísti á, at neyðugt er við dialogi millum veitararnar og myndugleikarnar. Her eru krøvini til góðskustýring av stórum týdningi. Í hesum sambandi hevur atlit til heilsu, umhvørvi og trygd alt at siga. Uppfylla veitararnir ikki hesi krøvini, sum longu eru kend aðrastaðni, so fáa tey ikki sáttmálar.

Hetta kundi Leif Præstegaard frá norska útgerðarbasanum CCB uttanfyri Bergen staðfesta. Hann helt fyri, at tað er slítandi, kostar nógvan pening og setir stór krøv annars at fara inn í hesa vinnuna, men úrslitið kann eisini gerast, at tú fær ein kappingarføra fyritøku og harvið lut í oljuvirkseminum. At raðfesta heilsu, umhvørvi og trygd høgt er ein fortreyt fyri einum góðum úrsliti vísti norðmaðurin á.

Jan Mortensen, stjóri í Vinnuhúsinum vísti á, at tørvur er á at menna føroyska lógarverkið við atliti til HUT-krøvini, tvs. til heilsu, umhvørvi og trygd. Sum er eru fáar lógir og reglur fyri slíkum her á landi. Nú oljuvinnan setir hesi so høgt eiga føroyskir myndugleikar eisini at fokusera meira uppá hetta økið. Hann vísti á, at virkini mugu taka støðu til, um tey vilja vera við í oljuvinnuni ella ikki. Tey mugu so eisini finna saman fyri at loysa trupulleikarnar.



Meira enn 100 fólk høvdu leitað sær á Handilsskúlanum á fyrsta fundin hjá Oljutinginum.

Mynd jan

# Mugu útbúgva okkum til oljuvinnu

Jan Müller

– Vit skulu nú orða málsetningin fyri og menna ymisku útbúgvingarnar í Føroyum við atliti at oljuvinnuni. Áðrenn vit taka støðu og avgera, hvørjar útbúgvingar vit vilja fullføra, er neyðugt at sundurgreina framtíðar tørvin innan fleiri fakgreinar. Hetta merkir eisini, at vit mugu ásanna, at vit ikki megna alt. Men tað vit avgera at vit skulu røkka, skal fullførast á einum førleikastigi, ið svarar til altjóða krøv. Føroysk arbeiðsmegi fær hervið eisini atgongd til ein stóran arbeiðsmarknað segði landsstýrismaðurin í undirvísingarmálum á Oljutinginum á Handilsskúlanum í farnu viku.

Tórbjørn Jacobsen greiddi frá, hvussu vit føroyingar síðani fyrst í 90-unum høvdu ment okkara útbúgvingarligu førleikar við atliti til eina oljuvinnu. Hetta byrjaði við, at stuðul var latin til ungar føroyingar, sum tóku kavaraútbúgving og er so hildið fram til vit í dag hava gjørt fleiri týðandi avtalur við norskar undirvísingarstovnar um samstarv.

Avtalurnar, sum vit hava gjørt við norsku skúlarnar, hava sum høvuðsmál at útbúgva føroyingar til komandi størv innan oljuvinnuna og gera ta føroysku útbúgvingarskipanina føra fyri at útbúgva arbeiðsmegi til oljuvinnuna.

Landsstýrismaðurin nevndi eisini týdningin av, at oljuvinnan er ein altjóða vinna, og at tað er sera umráðandi, at føroyski førleikin uppfyllir altjóða krøv.

– Lat okkum beinanvegin gera okkum greitt, at Undirvísingar- og Mentamálastýrið ætlar ikki, at tann minsti felagsnevnarin skal verða galdandi fyri okkara oljuútbúgvingar. Stýrið fer nú í samstarvi við vinnuskúlarnar at kanna, hvør førleiki er neyðugur og kravdur í sambandi við tær útbúgvingar, sum ætlanin er at seta á stovn.

– Neyðugt verður síðani at gera eina útbúgvingarætlan á hvørjum einstøkum skúla. Henda ætlan skal vera til allar lærarar, ið hava hug at menna teirra førleika innan ávísar lærugreinir. Vit vænta, og tað er eisini okkara vón, at tær fyritøkur, sum hava fingið boriloyvi, á virknan hátt fara at hjálpa til at fáa til vega neyðug praktikkpláss og útbúgvingarstørv segði landsstýrismaðurin.

Tórbjørn Jacobsen væntaði sær annars eitt positivt samstarv millum vinnuskúlarnar og tær avvarðandi oljufyritøkurnar. Hann nevndi eisini trygdarkrøvini, sum verða sett í oljuvinnuni og segði, at føroyngar fara at átaka sær at fyrisita og bjóða út skeið á hesum økinum í samsvari við krøvini hjá oljufyritøkunum.

# Handilsskúlin brynjar seg til oljuvinnu

Jan Müller

Millum skúlarnar í Føroyum, sum av álvara eru farnir at brynja seg út til eina komandi oljuvinnu, er Handilsskúlin. Tað kom eisini týðuliga til sjóndar á Oljutinginum í farnu viku, sum nettupp varð hildið í stóru høllini á Handilsskúlanum í Havn.

Ragnar Magnussen, stjóri megnaði á livandi og greiðan hátt at seta upp komandi ætlaninar hjá skúlanum. Hann vísti til tað samstarvið, sum Handilsskúlin hevur fingið í lag við BI-handilsskúlan í Stavanger. Innihaldið í hesum samstarvi er at fáa skeið og útbúgvingar á oljuøkinum inn um Handilsskúlans gátt við Marknagilsvegin. Og fyrireikingarnar eru komnar so mikið væl áleiðis, at Handilsskúlin í næstum kann bjóða eina røð av skeiðum.

Ragnar Magnussen segði, at tey vóru komin til, at skilabest var at byrja við HUT-undirvísingini tvs. innan heilsu, umhvørvi og trygd, nú júst hetta er so týðandi fortreyt fyri øllum oljuvirksemi og annars eisini øðrum virksemi í føroyska samfelagnum. Tað ræður um at flyta kunnleikan til HUT til Føroya sum skjótast, nú boringarnar standa fyri framman. Endamálið er so at senda hesa vitan út í samfelagið og eisini kanaliserra hana út aftur í vinnuna. Tað ræður tí um at menna føroyskan førleika á hesum økjum.

Longu í næsta ár verður farið undir 5 ymisk skeið í HUT. Næsta stig verður so at undirvísa í, hvussu man handfer sáttmálar í hesi nýggju vinnu. Og síðani gongur tað slag í slag alt árið 2001, 2002 og 2003 við at skipa undirvísing í góðskuleiðslu, projektstýring, roknskapi, fyrisiting og leiðslu, marknaðarføringsleiðslu, strategiskari leiðslu, oljubúskapi osfr.

Eisini umboð fyri BI vórðu við á Oljutinginum og greiddu frá BI. Tey sóu stórar møguleikar í tí samstarvi, sum er fingið í lag millum handilsskúlarnar báðar.



Frá Oljutinginum, har fleiri landsstýrismenn vóru við.

Mynd jan



# Frálíkt undirhald

*Stóra konsertin við Kulum Rótum, Trølla-Pætur og Kára Cool í Havn leygardagin eydnaðist sera væl. Talan var um gott og fjølbroytt undirhald til børnini*

Jonhard Hammer

Eini 1200 fólk vóru leygardagin til stóra barnatiltakið í ítróttarhøllini á Hálsi, har Kular Røtur, Trølla-Pætur og Kári Cool høvdu stórfingna konsert.

Og talan var eisini um frálíkt undirhald, har tann óskikkiligi Kári Cool var framúr sum frásøgumaður, og har Trølla-omman umsíður gjørdi sína entré. Trølla-Pætur var eisini á pallinum, filmur varð vístur á stórskíggja og allir hinir sangararnir í Kulum Rótum vóru eisini við.

Konsertin byrjaði eitt sindur óvanliga, tí eitt korter áðrenn, hon varð sett at byrja, kom tann kuli Kári Cool á pallin. Fólk fóru stórleypandi inn í høllina, tí tey hildu at konsertin var byrja, men tá var Kári Cool komin á pallin at siga fólki frá, at John Petersen hevði lagt Føroyar fram um niðri í Sveis.

## Á motorsúkklu

Tað var ikki smávegis gjørt burtur úr, tá Trølla-omman umsíðir traðkaði fram. Fyrst var ein filmur vístur á stórskíggja, har Trølla-omman koyrdi undan løgregluni.



Tað er einki at ivast í, at Kári Cool er coolastur í Føroyum



Trølla-Pætur hevði eina framúr góða framførslu í Ítróttarhøllini á Hálsi leygarkvøldið

Kári Cool fekk tá børnini at happa politiið við at rópa politiið-skiið

Og knappliga hoyrdist buldur frá eini motorsúkklu í høllini. Summi fólk hildu, at tað var Sofus sum var frá sær sjálvum og var farin á konsert við eini Harley Davidson, men so var ikki. Tað var Trølla-omman og Trølla-Pætur, sum drønaði allan vegin upp á pallin á eini motorsúkklu.

Umframt undirhaldið við Trølla-Pætur, ommuni og Kára Cool, var eisini nógvur tónleikur. Kular Røtur hava givið tvær fløgur út, og teir sera væl umtóktu sangirnar, vóru allir spældir. Sangararnir sungu sera væl, men kanska kundu onkrar teirra roynt at fingið betri samband við áhoyrarnar.

## Serstakt

Kular Røtur eru vorðnar eitt hugtak í Føroyum, og tað er ikki so løgið. Tað verður gjørt nógv burtur úr fyri at undirhalda børnini, og bæði tá talan er um tónleik, filmir, pallshow og annað er undirhaldið serstakt.

Tónleikurin er frálíkur, børnini kenna sangirnar, og tá stórt myndashow, motorsúkklur, dansarar og sangarar eru afturat kann tað valla ganga galið.

Konsertin leygardagin í Havn var frálík, og tað er neyvan ov nógv at ynskja sær, at Kular Røtur eisini í framtíðni fara at hava líknandi tiltak onkrastaðni í Føroyum.

# Arbeiðisbólkur skal mála oljutemperaturin

Jan Müller

– Føroyingar síggja fram til eina gevandi oljuvinnu, ið eyðvitað kemur at ávirka onnur virði í samfelagnum, sum vit eisini ynskja at varðveita. Tí ræður um at vera á støðugum varðhaldi og at dubba seg leypandi, fyri ikki at verða yvirrendur av fremmandum skaðalárinum, ið kunnu hótta tilveruna hjá teimum, sum altíð hava búð og fara at búgva her segði Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í menta- og undirvísingarmálum á fundi í Oljutinginum í farnu viku.

Hann boðaði í hesum viðfangi frá, at hann umhugsar at seta niður ein fylgjubólk av samfelagsfrøðingum og mentafólki, ið leypandi skal máta temperaturin og geva politiska valdinum góð ráð um, hvussu farast skal fram og hvussu skal stýrast ímillum boðar og sker, tá ið henda enn ókenda vinna tekur seg upp her á landi.

– Tað altavgerandi í øllum kolvetnismeldrinum er, at vit koma turrskøddir út úr honum aftur, soleiðis at vit eftir eitt møguligt oljuævintýr er liðugt, framvegis hava eitt siviliserað vælferðarsamfelag, sum tað er hugaligt og vert at búgva í segði landsstýrismaðurin.



*– Tað altavgerandi í øllum kolvetnismeldrinum er, at vit koma turrskøddir út úr honum aftur segði Tórbjørn Jacobsen á fundi í Oljutinginum. Man tað vera hetta, sum teknarin Óli P hevur hugsasð um, tá hann gjørdi hesa tekningina í Sosialinum?*


# Telefonbókin 2001

**Í mars 2001 verður telefonbókin fyri ár 2001 borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum.**

Virki og stovnar skulu boða frá um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt í næstu útgávu.



*Seinasta freist at lata broytingar inn er* ***týsdagin 31. oktober 2000***

**Hvítu síður**

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at koma við rættingum til Hvítu síður í telefonbókini fyri ár 2001 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 548 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til: Teknisk avgreiðsla, Føroya Tele, Postboks 27, FO-100 Tórshavn ella faks 31 79 68.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari, við undirstrikingum, eykaupptøkum og undirupptøkum. Prísurin er 57,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerkið:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er 1.500,00 kr (ikki íroknað mvg).

Talið av búmerkjum í Hvítu síðum er avmarkað.

**Gulu síður**

Týsdagin 31. oktober 2000 er seinasta freist, at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum. Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 547 í telefonbókini 2000, ið skal sendast til Teleforlagið.

**Prísir:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| (A)+(D) | Standardlýsing ................. | kr. | 650,00 |
| (B) | Stórt navn ..................... | kr. | 50,00 |
| (C) | Innramming ................... | kr. | 100,00 |
| (E) | Grafisk lýsing pr. mm (min. 30 mm) | kr. | 20,00 |

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.

**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

FØROYATELE

**att: Teleforlagið**

**Postboks 27 · 110 Tórshavn · tel 30 30 30 · fax 30 30 31**
**www.nummar.fo · info@nummar.fo**